# Hálvan tíma frá at verða stongt

**Føroya Arbeiðarafelag hótti í gjár við at boykotta Kollafjørð Pelagic á Langasandi og at taka alt arbeiðsfólkið heim av uppisjóvarvirkinum, men ein semja varð gjørd í evstu løtu**

FAKFELAGSSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, segði gjármorgunin, at viðurskiftini á virkinum á Langasandi eru so ótrygg og óskipað, at vórðu tey ikki fingin í rættlag alt fyri eitt, verða øll tey 50 fólkini á virkinum tikin úr arbeiði og send til hús.

Hon gav leiðslan á Kollafjørð Pelagic freist til klokkan 16 í gjár til at fáa viðurskiftini í rættlag.

Ingeborg Vinther staðfesti, at tað eru fleiri viðurskifti á virkinum, sum eru greið brot á tey minstukrøv, sum eru galdandi í sáttmálunum.

Arbeiðsfólkið arbeiðir í tveimum vaktum upp á 12 tímar hvør, við 25 fólkum á hvørjari vakt.

Men tey eru undirlønt og fáa sostatt ikki løn eftir sáttmálanum. Tað er onki høpi í mattíðunum, tí tær verða yvirhøvur ikki hildnar og arbeiðsfólkið manglar trygdarútgerð í ólukkumát, bæði hjálmar, trygdarstivlar, og termodraktir til tey, sum arbeiða í frystaríðnum.

Harafturat hava tey ikki fingið setanarskriv, sum tey eiga.

Hanus Hansen, sum ikki er dagligur leiðari, men ein av monnunum aftanfyri virkið, fór seinnapartin í gjár á fund við Føroya Arbeiðarafelag, og ein hálvan tíma fyri evstamark hevði hann tryggjað Føroya Arbeiðarafelag, at øll viðurskifti skulu fáast í rættlag alt fyri eitt.

Føroya Arbeiðarafelag fegnast um lyftið frá Hanusi Hansen, men sigur, at tey fara at hava eitt vakið eyga við virkinum at tryggja sær, at alt kemur upp á pláss.

Samatundis fær virkið sendandi krav eftir lønini, sum fólkið hevur fingið ov lítið, men kravið er ikki uppgjørt enn.


## Fyribilsstørv: Frítíðaravloysarar til Oyggjaleiðir

Við hesum verður søkt eftir stýrimonnum, maskinmeistarum, dekkarum, kokkum og tænastufólki til at avloysa umborð á skipunum í summar frá umleið fyrst í mai til seinast í september.

**Uppgávur umborð á skipunum**
Høvuðsuppgávan hjá Strandfaraskipunum er at røkja innanoyggja fólka- og farmaflutning eftir fastlagdari ferðaætlan og annars aðrar túrar við ferðafólki kring oyggjarnar.
Umsøkjarar skulu til eina og hvørja tíð kunna verða fluttir millum skipini, sum fyriskipað av leiðsluni.
Arbeiðstíðin er fyriskipað í mun til galdandi ferðaætlan hjá tí skipi, ið ein verður settur umborð á.

**Førleikakrøv**

**Stýrimenn**
- STCW-áteknað vinnubræv sum stýrimaður/skipari við handilsskipum
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- GMDSS, GOC
- Arpa
- Flutningur av vandamiklum farmi
- Sløkkileiðari
- Roykkavari
- Fyrsta hjálp

**Maskinmeistarar**
- STCW-áteknað vinnubræv sum skipsmaskinmeistari/maskinistur
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari

**Dekkarar**
- Heilsuprógv
- Kagaraprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Roykkavari

**Kokkar**
- Vinnubræv sum kokkur/skipskokkur
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu í bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið

**Tænastufólk**
- Heilsuprógv
- Prógv í nýtslu av bjargingarútgerð
- Sløkkiskeið
- Grundskeið í fyrstu hjálp

**Setanartreytir**
Vit rokna við, at tú hevur góð samstarvsevnir, dugir at arbeiða sjálvstøðugt, ert kunda¬vinalig/ur og røkin.
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir skulu sendast til:

Strandfaraskip landsins
Sjógøta 5
Postsmoga 30
FO-810 Tvøroyri

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi mikudagin 21. apríl kl 12:00.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til manningarsamskiparan á telefon 293044, ella senda honum ein teldupost til rok@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

Strandfaraskip Landins (SSL) eru landsfyritøka undir Vinnumálamálaráðnum, hvørs endamál er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir: 22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir. Talið av flutningsanleggum er 40 bussar, 8 ferjur og farmaflutningsútbúnaður. Starvsfólkini eru á leið 170 í tali, svarandi til 120 ársverk.


# Havnin samd um 10. flokk

**Skúlastýrið fyri Kommunuskúlan í Havn hevur tikið aftur kæruna móti Tórshavnar Býráð, og allir skúlarnir standa nú saman um NámX. Kommunuskúlan fær lut í leiðslu- og læraratoyminum**

SKÚLASTRÍÐ
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

10. floksstríðið í høvuðsstaðnum er av.

Hesum boðar Heðin Mortensen, borgarstjóri í Havn, frá.

Hann sigur, at partarnir, ið varða av 10. flokki í Tórshavnar Kommunu, hava funnið eina loysn á málinum, og skúlastýrið í Kommunuskúlanum hevur tikið kæruna ímóti Tórshavnar Býráð aftur.

- Kommunuskúlin fer nú eisini uppí samstarvið um Nám X á Eysturskúlanum og fær lut í leiðslu- og læraratoyminum. Í samráð við Mentamálaráðið verður leiðslukarmurin gjøllari avtalaður millum skúlastjórarnar, sigur Heðin Mortensen, sum fegnast um, at allir skúlarnir nú eru við í felags samstarvinum um 10. Flokk.

Hann ivast ikki í, at hetta verður eitt einastandandi tilboð til allar næmingar í Tórshavnar Kommunu.

